VINNUSÍÐURNAR

# Oljuprísir uppá langt og stutt sikt

VINNUSÍÐU-
GREININGIN
*Rolf Guttesen*
*Rg@geogr.ku.dk*



Tá Yom-Kippur ella Oktober-kríggið brast á í 1972, hækkaði prísurin á olju eftir stuttari tíð upp til tað 4-dupulta. Prísurin var í tátíðar pengum 3$ í 1972, men í 1974 var hann heilt uppi á 12$. Hetta kom sum eitt kvøkkur víða hvar, eisini í Føroyum.

## Einaferð var oljukreppa

Tað kallaðist oljukreppa, og nærmast panikkur kom í her í vesturheiminum, meðan tey kommunistisku londini, sum høvdu sítt egna system, sloppu undan í fyrsta umfari. Tað árið, á jólum 1973, vóru gøtulyktirnar sløktar í Vestur-Berlin og einki stórt jólatræ var á torginum. Men á Alexanderplatz í Eystur-Berlin, høvuðsstaðnum í DDR sum nú er horvið, vóru dupult so nógv elektrisk ljós á tí kommunala jólatrænum sum vanligt. Tað skuldi undirstrikast, at kapitalisman var í kreppu, meðan socialisman blómaði.

## Tað merkist væl í Føroyum

Vinnulívið følir beinanvegin um oljuprísirnir fara upp ella niður. Hækka prísirnir, verður dýrari at framleiða. Serliga innan vinnugreinir, sum brúka nógva olju ella oljuúrdráttir, merkjast broytingar. Eitt nú brúka trolarar meira olju enn línubátar, tí sjálvur veiðiháttur-in - við stórari maskinkraft at draga trolið gjøgnum sjógvin - krevur tað.




*Seinnapartin mánadagin, sum var fyrsti dagur aftaná jólahalguna, at valutahandilin var tikin upp aftur, stóð Euro sterkari enn nakrantíð í mun til US-Dollar. Við øðrum orðum er dollaravirðið fallið enn eina ferð. Fyri jól kostaði 1  íalt 1,3542$. Tann 27. desember var prísurin komin upp á 1,3631$. Gongdin vantast at halda fram, og eingi tekin eru til at ECB, European Central Bank, ætlar at keypa upp dollars fyri at stabilisera hann. Týsdag fyrrapart var dollarin styrknaður eitt sindur aftur, og soleiðis gongur tað upp og niður. Men tendensurin her seinast í 2004 er, sum trend-linjan vísir, ein styrking av  – Euro í mun til $ - Dollar*

Eftirsum oljan á heimsmarknaðinum verður príssett í dollars, er tað avgerandi hvussu prísurin útviklast á hesum báðum 'vørum'. Oljuprísurin hevur sum heild hesi seinastu fýra árini verið hækkandi, tó fallandi seinastu mánaðirnar. Hygg mynd 1 um tað søguliga perspektivið, og mynd 2 um tað seinastu gongdina. Dollars hava verið minkandi í virði seinastu árini (grein í Sosialinum, 11.dec). So tann ringasta støðan hjá einum føroyskum trolara ella húsarhaldi kemur í tá oljuprísur hækkar og dollars falla.

Øll føroysk húsarhald merkja tað eisini, tí upphitingin við oljufýri verður dýrari. Og sjálvt um hús flest í dag eru væl bjálvaði við rockwool, so eru oljuútreislurnar ein týðandi postur í húsarhaldinum hjá familjunum. Eisini SEV framleiðir streymin við størri útreiðslum, tí til dømis dieselverkið á Sundi verður drivið við olju.

## Hvat kostar oljan?

Fleiri faktorar ávirka prísin á olju á marknaðinum. Eitt er hvat ið tað kostar í framleiðsluútreiðslum. Annað er hvussu politisku viðurskiftini í heiminum laga seg, og hvussu hesi kunnu pressa prísin upp ella niður. Triðja er, at dollar-virðið og inflatiónin eisini hava sína ávirkan, bæði uppá stutt og langt sikt. Tá oljuprísir skula sammetast yvir longri skeið má fyrivarni takast fyri hesum og prísirnir mugu standardiserast á onkran hátt. Inflatiónin ger at sama vøra kostar meira í krónum ella dollars.

Tá eg var smádrongur, kostaði eitt frímerki til vanligt bræv 20 oyru, í dag kostar tað 550 oyru, ella 28 ferðir so nógv. Í 1948 kostaði ein tunna av ráolju 2,50$; í dag kostar hon knappar 50$, ella 20 ferðir so nógv. Fyri at kunna samanbera eru allir oljuprísir hereftir uppgivnir í 2000 dollarum.

Soleiðis kann sigast, at meðalprísurin á olju hevur í skeiðinum 1948-2004 verið umleið 21$. Prísurin í USA, heimsins størsti oljubrúkari, hevur í meðal ligið eitt sindur lægri, umleið 1_$.

## Oljuprísir og OPEC

Mynd 1 vísir oljuprísin, settur í 1996 dollars-virði, seinastu 35 árini. Rútar eru settir inn, sum forklára ymsar hendingar, sum álvarsliga sparkaðu prísin upp ella trýstu hann niður. Forsøgan er eisini spennandi, tí hetta er eisini ein kampur um lív og deyð millum monopolir sínámillum, millum monopolir og stjórnir, nationalistar og imperialistar, um býti av ríkidøminum. Stutt sagt eitt stríð um vald og ræði. Men hesa forsøguna lata vit liggja hesaferð.

OPEC, Organization of Petroleum Exporting Countries, varð grundað í 1960. Stovnandi lond vóru Iran, Irak, Saudi Arabia, Kuwait og Venezuela Tey oljuframleiðandi londini sóu, at útflutningurin av olju, hóast vaksandi í nøgd, varð minkandi í virði. Síðani Seinna Heimbardaga býtisvirðið fyri eina tunnu av olju fallið við 40 %.

Seinni, í 1971, komu fleiri lond aftrat: Indonesia, Nigeria, Libya, Algeria, Sameindu Arabisku Emiratini, Qatar. Og sama ár misti USA yvirræðið á príssetingini, sum skifti yvir til OPEC

## Yom-Kippur kríggið

Tann 5. oktober 1973 brast kríggj á millum Ísrael og Egyptaland-Sýria, kallað Yom-Kippur ella Oktober-kríggið. Grundin var einaferð enn tann óloysti Palestina-spurningurin. Ísrael hersetti stór økir, og fyri at pressa vestanveldini til at fáa Ísrael at taka seg aftur og fara at samráðast um tann óloysta spurningin, settu arabisku londini í verk embargo (oljuflutningsbann) móti tveimum útvaldum londum: USA, heimsins størsti brúkari og Hollandi, við størstu oljuhavnini Rotterdam. Og framleiðslan minkaði úr 5 niður í 1 millión tunnur dagliga (MTD). Hetta gav umgangandi prísunum eitt spark upp til meira enn tað dupulta. So koma eini 10 ár, har prísurin er rættiliga stabilur, men heldur sær á einum høgum støði.

Hetta fær tað positiva árinið, at nógv tiltøk verða sett í verk fyri at finna og troyta nýggjar keldur, fyri at útvikla nýggjar borihættir, fyri at spara uppá oljunýtsluna og at finna aðrar orkukeldur enn olju. Hús verða bjálvaði, termorútar verða settir í, nýggir bilar koyra fleiri kilometrar uppá liturin. Kjarnorka vinnur fram, vindorka fær nýggjar umstøður, el-verk leggja um frá olju til kol ella natúrgass.

*Framhald á síðu 19*